FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

**Almannamálaráðið**
**Eirargarður 2**
**FO-100 TÓRSHAVN**

Tórshavn 14. november 2019

Okkara tilv./Our ref.:
6650-3865/Morta/Almann-FAG-B.d
Tykkara tilv./Your ref.:

## Viðmerkingar til lógarpakka um at betra fíggjarligu viðurskifitini hjá fólkapensjónistum

Almannamálaráðið hevur sent Føroya Arbeiðsgevarafelag lógarpakka til hoyringar við 3 lógaruppskotum um broytingar í lógini um áseting og javning av almannaveitingum, broytingar í lógini um almannapensjónir og broytingar í lógini um áseting av skatti.

Lógarpakkin snýr seg um at hækka grundupphæddina í fólkapensjónini upp aftur á sama støði, sum hon var í 2015, at lækka frádráttarfríu inntøkuupphæddina samstundis sum mótrokningin verður lagaligari, umframt ein serligan skattafrádrátt til penjónistar.

Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við endamálinum í lógarpakkanum um at gera treytirnar lagaligari hjá teimum fólkapensjónistum, sum hava inntøkur afturat pensjónini, soleiðis at tað fer at loysa seg betur at arbeiða hjá teimum pensjónistum, ið hava møguleika og hug til tað.

Hetta samsvarar við tilmælini frá Føroya Arbeiðsgevarafelag um at lækka skattin á vanligari lønarinntøku, samstundis sum vinnan fær betri atgongd til arbeiðsmegi.

At hækka almannaveitingarnar er eisini eitt av tilmælunum í skattasjónarmiðunum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, har endamálið er at lækka vanliga lønarskattin, samstundis sum frádráttir og serskipanir verða strikaðar og brúkara- og tænastugjøld koma inn í myndina, men hetta letir seg tó neyvan gera, uttan at almannaveitingarnar eisini verða dagførdar og hækkaðar.

Tá ið tað er sagt, so fer Føroya Arbeiðsgevarafelag enn einaferð at undirstrika, at tilmælini um eina skattanýskipan við lægri lønarskatti, er ein langtíðarætlan, sum bert kann fremjast í tøttum samstarvi millum land og kommunur.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur tí ikki, at framferðahátturin við hesum lógarpakkanum er tann rætti, hóast Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við endamálinum við uppskotunum.

Land og kommunur mugu samskipa sínar ætlanir á skatta- og avgjaldsøkinum, fyri at nakað skilagott skal spyrjast burtur úr einari skattanýskipan yvir eitt longri áramál. Tað heldur ikki í longdini, at kommunurnar tala at, hvørja ferð uppskot um skattalættar o.a. verða løgd fram í Løgtinginum.

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo

Tað er somuleiðis ein týdningarmikil fortreyt fyri einari veruligari skattanýskipan, at lógaruppskotini á skatta- og avgjaldsøkinum eru fíggjaði.

Siðvenjan hjá politisku skipanini við at ikki at geva hoyringspørtunum ásettu hoyringsfreistirnar, vísir seg tíverri at halda fram, og Føroya Arbeiðsgevarafelag fer tí at heita á politisku skipanina um at fáa hesi viðurskifti í rættlag frameftir.

Vinarliga

Føroya Arbeiðsgevarafelag

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo